## Vælkomin á LS

Hesin faldari er ætlaður persónum, sum eru ávístir til eina neuropsykologiska kanning.
Tað kunnu vera persónar, sum hava fingið staðfest ein heilaskaða ella heilasjúku—ella har illgruni er um hetta. Eisini kunnu tað vera persónar, sum av øðrum orsøkum hava trupulleikar í gerandisdegnum og/ella á arbeiðsplássinum. Í hesum faldara eru upplýsingar um neuropsykologisku kanningina.

Tann neuropsykologiska kanningin gevur eina lýsing av hvørjar kognitivar førleikar, persónurin hevur varðveitt, og hvørjir møguliga eru versnaðir. Kanningin kann virka sum liður í at stilla eina diagnosu og kann saman við øðrum kanningum vera við til at geva eina betri fatan av sjúkuni ella skaðanum og kann vera við til at geva eina betri heildarmynd.

Landssjúkrahúsið

tel. 304500, www.lsh.fo

Landssjúkrahúsið




# Neuropsykologisk kanning

# Neuropsykologisk kanning

## Hvat er ein neuropsykologisk kanning?

Ein neuropsykologisk kanning fer fram hjá einum sálarfrøðingi, sum er serfrøðingur í, hvussu heilafunktiónir avspeglast í tankum, kenslum og atferð. Neuropsykologurin kannar ymiskar førleikar so sum:

- Koncentratiónsevni
- Uppmerksemi
- Innlæring og minni
- Tempo í hugsan
- Mál
- Yvirblikk, evni til planlegging og evni til at loysa truplar uppgávur
- Kenslur og persónligheitseyðkenni (td. angist, sinnalag, verumáti, tunglyndi)
- Evni til at meistra møguligar fylgjur eftir heilaskaða, sjúku ella annan mótgang
- Møguleikar hjá persóninum til at gagnnýta tey evni og styrki, sum hann/hon hevur

Tann neuropsykologiska kanningin kann vera við til at ávísa á hvørjum økjum, einkulti sjúklingurin hevur tørv á hjálp og hvussu, hann kann læra at meistra eina tilveru, hóast viknaðan kognitivan førleika.

Í øðrum førum er kanningin við til at lýsa, hvussu støðan hjá sjúklinginum broytist, td. í samband við eina ávísa viðgerð.



## Hvussu fyrigongur kanningin?

Kanningin byrjar við einari samrøðu um endamál við kanningini og staðfesting av, hvør hevur viðmælt kanningina. Spurt verður inn til upplýsingar viðv. núverandi og fyrrverandi sosialum- og heilsuviðurskiftum, td. útbúgving, starv, sjúka, skaðar, heilivágur og alkoholnýtsla. Avvarðandi kunnu luttaka í innleiðandi samrøðuni.

Síðani verða nakrar munnligar og skrivligar royndir gjøgnumførdar. Tær flestu uppgávurnar eru stuttar, men tær eru nógvar í tali, og kanningin kann tí taka upp til 3 tímar. Til tíðir verður kanningin býtt sundur til fleiri viðtalur. Eftir kanningina er vanligt, at tann kannaði er troyttur og hevur tørv á einum steðgi ella hvíld heima.

## Kanningin endar

Tann kannaði verður kunnaður um úrslitini , tá tey fyriliggja. Kanningarúrslitini verða send til viðkomandi, sum hevur umbiðið kanningina.

**Tað er umráðandi, at tann kannaði, tekur brillur og/ella hoyritól við til kanningina, um hann nýtir hesi í gerandisdegnum.**



Mai 2018